# Uppgávur

**Navn:** ____________

## Undanvitan




**Føroyingar hava sagt frá sagnum og ævintýrum í øldir. Tey kvóðu gomul kvæði við spennandi søgum. Alt hetta hendi í roykstovuni, meðan húsfólkið arbeiddi. Børnini lurtaðu sjálvandi eisini. Onkuntíð varð farið upp á gólv.**



**Tónleikabólkurin "Týr" heldur kvæðasøgur vera góðar. Týr spælir og syngur søgur úr kvæðum, t.d. um Ormin langa.**
**Tú kanst eisini lesa í søgubókum um Ormin langa.**



**Bókin "Torkils døtur" er upprunaliga eitt kvæði:**

Torkil eigur sær døtur tvær
*at dansa*
Leingi á morgni sova tær
*og væl er mær ansað*



**Orð:**
**vallari:** eitt rekavætti, ein sum fjakkar víða
**serkur:** undirklæði við ongum ella stuttum ermum
**festarmoy:** genta, ið er trúlovað drongi

## Les bókina

**• Í kvæðum eru nógvir mótsetningar. Finn mótsett orð:**

ríkur ____________________ skitin ____________________

góður ____________________ vakur ____________________

svartur ____________________ dovin ____________________

syrgin ____________________ deyður ____________________



**• Skriva:**

Torkil eigur eina dóttur, sum eitur ___ ___ ___

og eina dóttur, sum eitur ___ ___ ___ ___ ___ ___

Torkil eigur tvær ___ ___ ___ ___ ___

**• Orðagáta:**

Set fyrsta stavin í hesum myndum saman til eitt orð

   ð 

Torkils døtur er eitt ______________________________

• **Orðatøk. Set rætt saman. Set ⇨**

| | |
|---|---|
| Dagur dettur | ókunnigar gøtur |
| Tað, ið illa er yrkt, | av degi |
| Ikki er alt gull, | verður illa kvøðið |
| Blindar eru | ið glitrar |

• **Dugir tú at yrkja eitt ørindi um Katrina og Ásu:**

Tað skal hava 4 reglur við 8 stavilsum í hvørjari.

1. og 3. regla skulu ríma og 2. og 4. regla.

Tú kanst byrja soleiðis:

1.Torkil átti sær døtur tvær  (8 stavilsir)

2.____________________________________________

3.____________________________________________

4.____________________________________________

• **At giftast burtur merkir:**

at giftast langt burtur heimanífrá ☐

at giftast og ongantíð sleppa heimaftur ☐

at pápin letur onkran mann giftast dóttrini ☐



- **Hvítt og svart eru mótsetningar.**

**Hvat heldur tú litirnir umboða?**

Hvítt: ______________________________________

Svart: ______________________________________

Hví valdi Katrin svarta hestin? ____________________

- **Hvat hendir, tá Katrin er deyð? (s. 35 til 37)**

Har blóðið hjá Katrini rennur ____________________

Har høvdið á Katrini liggur ______________________

Har kroppurin á Katrini liggur ____________________



- **Lýs vallaran (s. 29)**

Vallarin er ____________________________________

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

Tá søgan byrjar er Torkil ein __________ maður

Tá søgan endar er Torkil ein __________ maður